# Oljan størsta broytingin nakrantíð fyri Føroyar

*Føroysk oljufeløg brúk fyri útlendskum kapitali eisini*

JAN MÜLLER
STAVANGER

Olaf Olsen heldur tað vera lovandi fyri okkum, nú tá útlendsku serfrøðingarnir eru so vísir í, at olja finst við Føroyar. Finst oljan og tað loysir seg at útvinna hana, so metir Olaf Olsen hetta at verða ta størstu broyting, sum føroyska samfelagið nakrantíð hevur verið fyri. Og tá mugu vit øll gera okkum ómak at royna at fóta okkum í tí og ikki missa ov nógv annað burtur sigur hann.

-Hetta er ein avbjóðing og tá føroyingar hava verið góðir til at taka ímóti avbjóðingum, so vóni eg eisini, at teir fara at vera tað í hesi vinnuni.

**Brúk fyri útlendskum kapitali**

Nú eitt ávíst orðaskifti hevur tikið seg upp um, hvat er eitt føroyskt felag og hvør er tørvurin á útlendskum kapitali, heldur Olaf Olsen, at bæði tey føroysku oljufeløgini fara at hava brúk fyri heilt nógvum útlendskum pengum. Sjálvur sigur hann, at tað í dag eru fleiri føroyskar fyritøkur, sum hava nokkso fitt av pengum í Føroya Kolvetni, og sum nú eiga 7% av rættindunum í oljuloyvinum. -Vit hava eisini møguleikan at fara uppá 20% í loyvinum, og hetta halda vit vera sera spennandi. Hann vísir á, at tað í framtíðini verður møguleiki hjá fleiri føroyingum at seta pengar í felagið.

Olaf Olsen heldur eisini konseptið, sum hitt føroyska felagið brúkar við bert at hava føroyskan kapital vera áhugavert, men hann metir sjálvur, at felagið fer eisini at hava brúk fyri útlendskum kapitali, serliga um tað skal taka ein størri part av loyvinum. -Sjálvur meti eg annars ikki, at tað er nóg nógv til av føroyskum kapitali til at seta í oljuvinnuna fyri at taka kann blíva nakar stórur partur hjá føroyingum. So vit vera noyddir at vera saman við øðrum.

Olaf Olsen vónar tað besta fyri bæði tey privatu føroysku oljufeløgini. -Tað er føroyskur kapitalur í báðum. Tað er gott, og vónandi verður eisini avgerðarrættur og annað og eisini vinningur til føroysku íleggjararnar.

**Sagexfólkini**

Uppá fyrispurning hvussu verður við samstarvinum við Sagexfólkini sigur Olaf Olsen, at teir vóru noyddir at taka seg úr samstarvinum eftir fútaforboðið. -Teir fóru út, og so komu aðrir inn, og tí er tað ikki so øgiliga áhugavert, um teir koma aftur ella ikki, tí vit hava fótað okkum uttan teir.

Olaf Olsen váttar, at teimum nýtist ikki at hava Sagex sum ráðgevar í framtíðini, nú teir samstarva við Agip. Hann vísir á, at samstarvið við Sagex óivað er liðugt. Olaf Olsen sigur tó, at teir hava ikki útilokað nakran. Samstarvið við Sagaex var sera gott og fólkini vóru tað eisini. Hvat tað annars kann blíva til at samarbeiði í framtíðini stendur opið sigur nevndarlimurin í Føroya Kolvetni.

## -Verða boð eftir mær kavi eg aftur

*Tað vóru tey greiðu boðini, norski kavarin, Jon Are Hvalbye, gav teimum mongu tíðindafólkunum, sum vóru komin til Kirkenes at hitta kavararnar, sum royndu at bjarga manningini á sokna russiska kavbátinum „Kursk“.*

Úr trýstrúminum umborð á kavaraskipinum „Seaway Eagle“ greiddu hann og felagar hansara frá, hvussu teir høvdu upplivað ferðirnar niður til kavbátin. Teir seks kavararnir, sum vóru niðri hjá „Kursk“, vóru tveir norðmenn og fýra bretar.

Jon Are Hvalbye greiddi frá, at hendan uppgávan var ikki so nógv ørvísið enn aðrar uppgávur, hann hevði verið vil til, men ein munur var tó, at hesaferð hendi so nógv rundan um teir. Harafturat gjørdu tær serligu umstøðurnar, at kavararnir noyddust at savna tankarnar um uppgávuna og samstundis royna at gloyma alt annað.

Russisku myndugleikarnir hava fyrr sagt, at kavararnir sóu líkið av onkrum av manningini, men tað avsannaðu norsku og bretsku kavararnir. Og hóast uppgávan fyri teimum flestu ivaleyst kann tykjast óhugnalig, var Jon Are Hvalbye ikki í iva um svarið, verður hann biðin um at fara niðuraftur:

-Játtar arbeiðsgevarin Stolt Offshore at royna at bjarga líkunum, eri eg til reiðar at kava niður til „Kursk“ aftur. Men eg vænti, at tað verður ein trupul uppgáva, segði Jon Are Hvalbye.

**Í trýstrúmi**

Teir seks kavararnir sleppa ikki út úr trýstrúminum umborð á „Seaway Eagle“, fyrr enn teir hava vant seg til tað vanliga trýstið. Tá teir vóru niðri á botni í Barentshavinum, var trýstið ellivu ferðir størri enn omaná, men í morginári sleppa teir útaftur. Teir skulu tó verða umborð á kavaraskipinum eitt samdøgur, eftir at teir eru slopnir úr trýstrúminum. Teir hava nú onga neyð, tí í trýstrúminum hava teir bæði stovu, kamar, bað og toilett. Kaffi fáa teir ígjøgnum eina lúku.

„Seaway Eagle“ fór úr Kirkenes seinnapartin í gjár, og mánadagin sleppa teir seks kavararnir í land í Tromsø.

*Poul Mohr, nevdarlimur í Atlants Kolvetni:*

# Rætt at stovna føroyskt oljufelag

*-Tað hevði verið ov seint í dag at farið undir eitt føroyskt oljufelag. So vil tíðin vísa, hvat kemur burtur úr. Poul Mohr, nevndarlimur í Atlants Kolvetni er tí sannførdur um, at tað var ein røtt avgerð at taka at stovna eitt føroyskt oljufelag.*

JAN MÜLLER
STAVANGER

-Vit eru væl nøgdir, tí okkara samstarvspartnarar eru væl nøgdir. Soleiðis tekur Poul Mohr, nevndarlimur í føroyska oljufelagnum, Atlantic Petroleum, fyri, nú hann á altjóða oljuráðstevnuni í Stavanger roynir at marknaðarføra Føroyar sum komandi oljuland.

Hann heldur, at teir eru komnir væl fyri, tí teir eru eitt 100% føroyskt oljufelag. Poul Mohr, sum í hesum døgum, hevur verið við oljumesssuni í Stavanger, heldur seg síggja nógvar paralellir millum Noreg og Føroyar, nú oljuspurningar eru frammi.

Týskvøldið beyð Stavanger Næringsforening, sum umboðar allar tær norsku fyritøkur í oljuvinnuni her um leiðir, øllum teimum umleið 100 føroysku luttakarunum á oljumessuni til ein døgurða.

Undir samkomuni hugleiddi formaðurin í felagnum um tíðina, áðrenn oljan kom til Stavanger og tá tað varð sagt, at tað fanst eingin olja í Noregi, nú farið varð undir at leita.

Hetta er tað sama sum Poul Mohr segði, tá hann og aðrir fóru undir at stovna Atlantskolvetni. – Tað nyttar ikki at standa undir neystaveggginum við hondum í lumma og hyggja at, meðan aðrir fara avstað við oljuni.

Við hesum sipar Poul Mohr til, at tað hevði verið ov seint í dag at farið undir eitt føroyskt oljufelag. So vil tíðina vísa, hvat kemur burtur úr. Hann er sannførdur um, at tað var ein røtt avgerð at taka at stovna eitt føroyskt oljufelag.

**Skipasmiðjan við**

Tórshavnar Skipasmiðja er annars millum mongu føroysku luttakararnar á ONS. Saman við skotska felagnum Asco verður havnalagið á Sundi marknaðarført sum ein komandi oljuútgerðarhavn. Poul Mohr sigur, at tað verður arbeitt við hesum alla tíðina men váttar tó, at bólkurin, sum Atlantic Petroleum er partur av, er ikki bundin at felagnum, sum stendur fyri ætlanunum á Sundi. – Eg haldi man skal ansa sera væl eftir ikki at blanda saman, at Tórshavnar Skipasmiðja hevur sett pengar í Atlants Kolvetni og at Tórshavnar Skipasmiðja arbeiðir við eini útgerðarhavn. Tað hevur einki við hvørt annað at gera.

Uppá fyrispurning um tað ikki kann gagna Tórshavnar Skipasmiðju og ætlanunum á Sundi at hava sett pening í Atlants Kolvetni sigur Poul Mohr, at hetta kanska tvørturímóti er verri fyri teir. – Eg veit væl, at tað verður tosað um hetta og funnist at tí, men tað má eg so bara liva við.

Poul Mohr er samdur við teir mongu útlendsku oljumenninar, sum siga, at føroysku oljumyndugleikarnir hava arbeitt væl og skjótt. – Eg haldi teir hava alt rós uppiborið og her hava onnur kanska nógv at læra.

Tey trý plássini í Føroyum, sum bjóða seg fram til oljuútgerðarhavn eru øll umboðað á føroyska básinum í Stavanger, Sund, Runavík og Drelnes. Sambært loyvunum skulu oljufeløgini innan tríggjar mánaðir eftir at tey hava fingið loyvi boða føroysku umsitingini frá, hvussu tey vilja loysa spurningin viðvíkjandi útgerðarhavn oø. Tað er tí stórur spenningur millum tey trý plássini, hvat oljufeløgini fara at velja.

Okkurt kundi bent á, at feløgini koma at taka eina felags støðu til henda spurningin, nú tað hevur verið lagt upp til eitt samstarv millum feløgini bæði hvat viðvíkur logistikki og boring.




RIMMAR ÚTSØLA
÷50% ÷30% ÷20% bæði av mótaklæðum og meturvørum
Eisini hava vit nógvar góðar restir
Byrjar í dag 25/8 kl. 10.00
SONJA DESIGN
Stoffalág 41 • 100 Tórshavn • Tel. 314979
(Oman fyri Lágargarð)
Sosialurin - 311820

**Søkt verður eftir**
álítandi manni til sjálvstøðugt arbeiði at byrja beinanvegin.
Umsøkjarin skal hava koyrikort.
**Skorsteinssóparin**
Hvalvík · Tlf. 422456

**Vit átaka okkum allan vanligan grevstur við beltmaskinum so sum:**

* Útstykkingar
* Grundstykkir
* Planering
* Veitir
* Tún
* Innkoyringar
* Vatn-/kaðalveitir
* Havar o.a.
Ring og hoyr nærri. Vit geva óbindandi tilboð.
Koyrt verður um landið.
**ES-grevstur**
Tórshavn • Tel. 21 66 00
Sosialurin - 311820




**Reyði krossur Føroya**
Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. 19[00] til 21[00]
☎ 212380

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
Sí SVF tekstvarp s. 650

sosialurin
Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo

**Føroya Sjómansskúli**
Maritime College

**Skeiðdeildin**
Skeiðdeildin á Føroya Sjómansskúla skipar fyri eftirútbúgving av sjómonnum

Skeiðætlanin fyri 2. hálvár 2000

| | | |
|---|---|---|
| **ARPA** | | |
| Byrjar 16. oktober | 4 dagar | kr. 7.000 |
| Byrjar 13. november | 4 dagar | kr. 7.000 |
| **GOC (generelt certifikat sum radiooperatørur)** | | |
| Byrjar 23. oktober | 15 dagar | kr. 9.900 |
| **GMDSS-endurnýggjan** | | |
| | 5 dagar | kr. 5.900 |
| **Olju-, gass- og kem. 1. partur (Tanker Safety)** | | |
| Byrjar 23. oktober | 5 dagar | kr. 4.500 |
| **Flutningur av vandamiklum evnum** | | |
| Byrjar 30. oktober | 4 dagar | kr. 3.500 |
| **Arbeiðsumhvørvi (§16)** | | |
| Byrjar 6. november | 4 dagar | kr. 4.000 |
| **VHF-skeið** | | |
| Byrjar 28. august | 5 dagar | kr. 2.000 |
| Byrjar 13. november | 5 dagar | kr. 2.000 |

Øll skeiðini eru dagskeið, og undirvísingin fer fram á skúlanum kl. 8-15. Tó er VHF-skeiðið kvøldskeið. Skúlin hevur møguleika at skipa fyri øðrum skeiðum, umframt nevndu skeið til aðrar tíðir. Meiri fæst at vita við at seta seg í samband við skúlan.

Tilmelding á tel 31 1749 ella sg@farnav.fo

*Útbúgvingarnar á Føroya Sjómansskúla eru góðkendar av Føroya Landsstýri, søfartsstyrelsen og IMO*



Nóatún 2
Postboks 104
FO-110 Tórshavn
Føroyar
Tel +298 311749
Fax +298 318122
farnav@farnav.fo
www.farnav.fo

petur & petur 320870

**EB-DAGAR**
**25. - 26. - 27. august 2000**
**Ítróttardagarnir byrja fríggjadagin 25.08 niðri á Mølini við hesi skrá:**

**Fríggjadagur 25.08.00**
Kl. 18.30 **Ítróttargudstænasta við Emil Olsen** *á Mølini*
**Triathlon** *av Vátanesi*
**Brotssparkkapping** (Børn og vaksin) *á Mølini*
**Tombola - Hoppiborg - Pylsuvognur v.m.** *á Mølini*
Kl. 21.00 **Barnadiskotek** *í EB-húsinum*
Kl. 23.00 **Ungdómsdiskotek** *í EB-húsinum*

**Leygardagur 26.08.00**
Kl. 09.00 **Fótbóltur:** *Piltar* ............ **EB/Streymur b – B68 b**
**B68 b – KÍ c**
**KÍ c – EB/Streymur b**
Kl. 11.00 **Fótbóltur:** *Smádreingir*.. **EB/Streymur – B36**
Kl. 12.30 **Fótbóltur:** *Piltar*............. **NSÍ a – B71 a**
**B71 a – EB/Streymur a**
**EB/Streymur a – NSÍ a**
Kl. 12.00 **Krokk-kapping** (innleiðandi umfar)
Kl. 14.00 **Kajak** *niðri á Vatni*
Kl. 14.00 **Látrið er opið** (kl. 14.00 til 16.00)
Kl. 15.00 **Fótbóltur:** *2. deild menn* **EB/Streymur – LÍF**
Kl. 17.00 **Fótbóltur:** *Kvinnur* .........**EB/Streymur – AB**
Kl. 18.00 **Barnatombola - Køkutombola - Fiskibrunnur - Matsøla** *í EB-húsinum*
Kl. 18.00 **Skjótibásur - Hamarslag - Hoppiborg - Pylsuvognur** *í Bygdini*
Kl. 19.00 **Krokk-kapping** (finaluumfarið)
Kl. 20.00 **Rulluskoytukapping** *á kaiøkinum*
Teir luttakandi bólkarnir eru: 1. og 2. flokkur og yngri, 3. og 4. flokkur, 5. og 6. flokkur, 7. flokkur og eldri
Kl. 22.00 **Felagssangur á Vaglinum. Edvard í Skorini flytir fram røðu.**
**Meksikansk veðrauppboðsøla** (20 krónur fyri hvørt boðið)
Kl. 23.30 **Dansur** ***við Bjørn Djurhuus band*** *í EB-húsinum*

**Sunnudagur 27.08.00**
Kl. 14.00 **Látrið er opið** (kl. 14.00 til 16.00)
Kl. 16.00 **Kappingar millum foreldur og børn**

**Mánadagur 28.08.00**
Kl. 20.00 **Bingo** *í EB-húsinum*